Undirvísingar- og Mentamálstýrið
Mentamáladeildin

Skrivari/málsviðgeri

Starvið:
Vegna barnsburðarfarloyvi er eitt áhugavert og fjølbroytt starv sum skrivari og málsviðgeri leyst at søkja á Mentamáladeildini. Setanartíðin er frá 1. januar 2001 til 1. august 2001.

Høvuðsuppgávurnar hjá skrivaranum eru m.a.:
- Verða skrivari hjá deildarstjóranum, deildini og ávísum nevndum
- Umsita virkisøki, sum verða løgd til skrivaran
- Málsviðgerð
- Samskipa og fyrireika tær ymisku arbeiðsuppgávunar í Mentamáladeildini
- Verða við á fundum og skriva fundarfrágreiðingar
- Aðrar uppgávur

Førleikakrøv
Vit hava hugsað okkum, at tú hevur útbúgving og/ella royndir í skrivstovuyrkinum og hevur góðan kunnleika til edv. Harumframt eigur tú at duga væl føroyskt, enskt, duga at arbeiða sjálvstøðugt og hava góð samstarvsevni.

Tað er eitt krav, at tú í minsta lagi hevur HH-, students-, HF-prógv ella annað prógv, ið kann javnmetast við hesi.

Vit bjóða:
- Eitt spennandi starv við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti úteftir
- Eitt á mangan hátt sjálvstøðugt starv

Tú kemur at arbeiða í einum spennandi umhvørvi við skiftandi uppgávum tætt saman við politisku myndugleikunum og stovnum innan undirvísing og mentan.

Setanar- og lønartreytir
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið og verður lønt í 15. lønarflokki.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um aðalstýrini, Løgmansskrivstovuna og deildir tess.

Umsókn
Umsókn við prógvum o.ø skulu sendast til:

Undirvísingar- og Mentamálastýrið
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 15. november 2000.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Jóannes Dalsgaard, deildarstjóra fyri Mentamáladeildina í Undirvísingar- og Mentamálastýrinum, ella Hannu D. Jacobsen á tlf. 35 50 50.

Undirvísingar- og mentamálastýrið *hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, útrótti og øðrum frítíðarvirksemi. Undirvísingar- og mentamálastýrið er skipað í tríggjar deildir – Mentamáladeild, Fólkaskúladeild og Vinnu- og miðnámsskúladeild.*
Mentamáladeildin *hevur fyrisitingina av hægri útbúgvingum, mentamálum og gransking, loftmiðlum, útrótti og øðrum frítíðarvirksemi. Harafturat fyrisitur deildin ávísar uppgávur viðvíkjandi kirkjuni.*

T Ó R S H A V N A R K O M M U N A

VALLISTAR

Sagt verður frá, at vallistar til býráðsvalið tann 21. november 2000 í Tórshavnar kommunu eru til skjals í snarskivuni hjá Tórshavnar kommunu, í Andrasarstovu á Argjum, hjá Sjúrði Nysted í Kaldbak og á kommunuskrivstovuni í Kollafirði frá 23. oktober til 6. november 2000.

Kærur um skeivleikar á listanum skulu sendast valnevndini í seinasta lagi 1 viku fyri valdagin.

Tórshavnar býráð

S N A R S K I V A N

Vegna amerikanskt útgerðarfelag verður søkt eftir royndum

rækjuskipara
(minst 10 ára royndir),
maskinstjóra
og
verksmiðjuformanni
til trolaran »Arcadian Gale«.

Nærri fæst at vita hjá:

TOR SKIPARAKSTUR
tlf. 31 85 31

Grundøki til sølu

Grundøki Undir Brúnni 33, Klaksvík, til sølu.

Tlf. 45 56 00 - 28 31 24

Bilur við skaða til sølu

Merki: Nissan Almera 2,0 Diesel, 4 hurðar
Árg.: 1996
KM: 95.120

Kann síggjast á Tryggingarfelagnum Føroyar við Smyrilsvegin, Tórshavn

Bilurin verður seldur sum hann stendur nú.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
Sýnsmaður: Fróði Müller
tlf. 34 56 00 - lokal 727, fartlf.: 28 38 92
fax nr. 34 56 07
at hitta millum kl. 13.00–15.00

RØR & BLIKK

NÝGERÐ, UMVÆLING OG VIÐLÍKAHALD :
- HITI, VATN, SANITET OG VENTILATIÓN.
- VATNVIÐGERÐ TIL SVIMJIHYLAR.

SØLA :
- BOBLIBAÐ
- EVNI TIL VATNREINSING Í SVIMJIHYLUM.
- ÚTGERÐ TIL SVIMJIHYLAR.
- PVC RØR OG FITTINGS.

TILBOÐ UPPÁ STØRRI OG SMÆRRI ARBEIÐI
Telefon 225345 ; T-post : rorblikk@post.olivant.fo

ADC-Heilsølan
Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893
ARBEIÐSHANDSKAR
Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi
LANDSINS STØRSTA ÚRVAL
frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar
BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA
ADC

VEGG SAGING Hurðar,vindeygu, veggir, garðar o.a.	HOL SAGING Frá Ø 24 mm. til Ø 450 mm.
GÓLV FRESING GÓLV SLÍPING	GÓLV SAGING Rennir, keiøki, asfalt, upptøka og burturbeining o.a.

Nýggj tænasta til allar havnir í Føroyum.
Nú bora vit eisini hol í allar støddir av dekkum til fríhold.

FØROYA BETONG SAGING v/Hjaltur Tausen
Gerðisvegur • 620 Runavík • Tel. 447543 • Fax 448898

DANNY TRANSPORT
- tá okkurt skal koyrast ella goymast
Tlf. 319192

BÁRUBILUR
Toyota Avensis Sedan 1.8, koyrt 1.000 km., til sølu við avsláttri
Tel. 371892

---

tvis DYGDAR KØKAR
Við framkomnari telduútgerð tekna vit júst TYGARA køk so hann er ein mynd av veruliga køkinum
pf.KLEMENT PETERSEN
Høgaból • 600 Saltangará • Tel. 44 75 60 • Fax 44 84 60

Føroya Tele

Hús at leiga

Til marknaðarstjóra okkara leita vit eftir húsum í Tórshavn ella Hoyvík.
At leiga frá 1. desember.

Áhugað kunnu venda sær til

Føroya Tele
Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
100 Tórshavn

FØROYA TELE
Tel 30 30 30 - Fax 30 30 31 - www.tele.fo
Føroya Tele er ansað tykjast fyri FF fatoyrkið - Reg. no. 2007

SKEIÐSDEPILIN Á LANGASANDI
The Dance Centre at Langasandur

- Byrjanarundirvísing í føroyskum og enskum
- Altjóða skeið í samstarvi við Cambridge University
- Serskeið eftir ynski

Lætt, stuttligt, mennandi

Tel. 422574 - Fax 422521
www.depilin.fo

Leiðaraskeið

Leiðslumenning og læra at loysa trupulleikar - Leiðsluskeið 2
Frá trupulleika til munadygga avgerð

Endamál:
At tú sum leiðari lærir at seta mál, skipa, stýra og menna eini avgerðarmannagongd hjá einum bólki, soleiðis at innlitið og royndirnar hjá øllum koma til gagns, og at ein munadygg avgerð verður tikin.

Stevnumið:
Eftir lokið skeið hevur tú fingið royndir og førleika í:
- At leggja arbeiði í einum bólki til rættis á ein hátt, ið tryggjar, at málið verður rokkið
- At skapa arbeiðsumstøður, ið tryggja, at uppgávur verða loystar á besta hátt
- At útnytta tilfeingi hjá hvørjum einstøkum luttakara til fulnar
- At hava umsjón við arbeiðinum í einum bólki soleiðis, at menning er í avgerðargongdini

Arbeiðsháttur:
Arbeiðshátturin gevur luttakarunum møguleika fyri:
- At royna seg við ymsum framferðarhættum
- At viðgera upplivingar og at læra av tí

Innanhýsis sjónvarp verður nýtt

Innihald:
Á skeiðinum fært tú venjingar í og vitan um:
- At taka dygdargóðar og samtykkiligar avgerðir
- At leiða út frá eini givnari støðu
- At leiða arbeiði við trupulleikagreining við at brúka:
  - trupulleikagreinig
  - arbeiðshættir
  - stýring
  - mannagongd
  - og greining av arbeiðsgongd í bólki

Tíð: Hósdagin 2. nov. 2000 kl. 09.00 til Leygardagin 4. nov. 2000 kl. 16.30
Staður: Hotel Eiði. Skeiðið er eitt internetskeið
Skeiðleiðari: Peter Gram og Gloria Kalsø frá LMB
Kostnaður: Kr. 7.000,- fyri hvønn, íroknað matur og gisting
Tilmelding: Hósdagin 19. oktober 2000

LMB (LeiðsluMenningarBólkurin) er ein arbeisbólkur, ið er samansettur av Føroya Handilsskúla, Føroya Arbeiðsgevarafelag, Føroya Ídnaðarfelag og Menningarstovuni við tí endamáli at eggja til sjónir, manna leiðslur og skipa fyri skeiðum. Skeiðrøðin Heystið 2000 fevnir um hesi skeið: Leiðsluframferð - Leiðslumenning og læra at loysa trupuleikar - Grundskeið í leiðslu.

Skeiðini eru ætlað leiðarum, millumleiðarum og komandi leiðarum.
Fleiri upplýsingar og tilmeldingarblað fáast við at venda sær til:

LeiðsluMenningarBólkurin
SKEIÐTÆNASTA HANDILSSKÚLANS
Marknagilsvegur 77 • Postmoga 177 • 110 Tórshavn • Tel 317177 • Fax 313374

---

16. oktober Mánadagin 16. oktober

Innandura-venjingar byrja aftur!

Mánadagin 16. oktober byrja innanduravenjingarnar hjá B36 aftur í Ítróttarhøllini.

Venjingarnar vera soleiðis:

Mánadagar	
15.00-16.30	Smápiltar
16.30-18.00	Pinkulingar
18.00-19.00	Gentur 10-12 & Gentur 12-14
Mikudagar	
15.00-16.30	Piltar
Fríggjadagar	
17.00-18.00	Pinkur
18.00-19.00	Smádreingir

Kom og ver við frá byrjan. Klipp hesa lýsingina út ella minn teg á venjingartíðirnar á www.b36.fo.

Vælkomin!